# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Fiat 80 ár í Danmark



Fiat 500 Topolino var ein nógv seldur bilur í 30-unum

Fiat 500 er ein av mest seldu bilum í Danmark í ár

Í ár eru 80 ár liðin síðan fyrstu Fiat bilarnir komu til Danmarkar.

Hóast italska Fiat verksmiðjan er 111 ára gomul, var tað ikki fyrr enn í oktober 1930 at fyrsti Fiat varð seldur í Danmark. Fiat í Danmark og Føroyum hátíðarhalda hesi 80 árini við m.a. at selja bilar til ein heilt serligan jubileumsprís.

# Nýggjur bussur til Giljanes




Volvo bussurin hjá Sp/f á Giljanesi hevur pláss til 44 ferðafólk umframt ferðaleiðaran

Mánadagin 15. november bjóðaði Niels Olgar Joensen frá Sp/f á Giljanesi fólki frá ferðavinnuni og øðrum at síggja ein Volvo buss, sum fyritøkan hevur fingið til at koyra ferðafólk við.

Talan er um ein lítið brúktan 12 metrar langan Volvo 9900 buss við 44 setrum umframt setri til ferðaleiðaran. Bussurin er væl útgjørdur við t.d. kaffimaskinu, køliskipan, køliskápi og WC. Tað sum er sermerkt við hesum bussinum er, at sera gott beinpláss er millum øll setrini.

## Hósdagin 25. november kl. 17.10

Í sendingini Vinnu- & Bilradio er ein samrøða við Niels Olgar Joensen frá Sp/f á Giljanesi um nýggja Volvo bussin, sum fyritøkan hevur fingið til at koyra ferðafólk við.

Eisini verður prátað við Jákup Eli á Lava, sum hevur ein Ford Mustang frá 1966.

Í vinnuinnslagnum verður vitjað á Snælduni Strondum, har stjórin í fyritøkuni, Karl Jóhan Olsen, fortelur um søguna og virksemið hjá Snælduni.



Jákup Eli á Lava



Karl Jóhan Olsen

Vinnu- & bilradio á Rás 2